# Ársfrágreiðing Sjúkrarøktaretiska Ráðið 2021

Aftur í ár, hevur korona merkt virksemi í Sjúkrarøktaretiska Ráðnum. Aðalfundurin var útsettur og varð tí ikki hildin fyrrenn í mai mánaða. Men tá fingu vit so endiliga høvi at vísa limunum nýggja búmerkið, meðan Katrin Andersen las tekstin upp, sum er orðaður til at lýsa týdningin í búmerkinum.

Tveir ráðslimir stóðu fyri valið í ár. Hesir vóru Birna Mohr Joensen og Marjun Thomsen. Báðar tóku við afturvalið og vóru valdar. Tiltakslimur ráðsins, Hildur við Høgadalsá, tók somuleiðis við afturvali og var eisini vald inn aftur. Ráðið skipaði seg eftir hetta við Janu Mortensen sum forkvinnu, Katrin Andersen sum næstforkvinnu, Birnu Mohr Joensen sum skrivara, Marjun Thomsen sum kassameistara, Lillian Dam sum nevndarlim og Hildur við Høgadalsá sum tiltakslim.

SER arbeiðir javnan við at endurskoða Yrkisetisku leiðreglurnar, og tað arbeiðið var lagt fram fyri aðalfundin, sum góðtók broytingarnar í uppskoti. Ráðið hevði eisini broytingaruppskot til viðtøkurnar, sum nevndin í Felagnum Føroyskir SJúkrarøktarfrøðingar góðkendi og sum limirnir vórðu kunnaðir um á aðalfundinum.

Temadagurin við etikaranum Jacob Birkler, sum skuldi verða í desember í fjør, bleiv vegna korona útsettur til seinast í apríl, og síðan útsettur av somu orsøk enn einaferð til oktober, tá tað endiliga eydnaðist. Tað var tó ikki uttan háspenning í luftini, tí Korona aftur gjørdi hvat hon kundi, fyri at spilla spælið. Hon megnaði tað partvíst, tí nógv vóru tey, sum máttu setast aftur. Fyri at bøta um skaðan, valdu vit at stroyma tiltakið. Tey sum vóru á Hotel Føroyum, vóru tó ikki snýtt, tí tey í veruleikanum bara høvdu goldið fyri mat og drekka. Sjálvan fyrilesturin við Birkler, høvdu SER saman við áhugafeløgunum goldið fyri.

Í september vóru umboð fyri SER á árliga norðurlendska ráðsfundinum, sum hesuferð var hildin á Koldingfjord, við tað at Danmark var vertsland. Høvuðsevni var avbjóðingar við Korona og ein felags yvirlýsing varð gjørd, sum er at finna á heimasíðuni hjá FFS www.sjukrarokt.fo. Harumframt hava forkvinnurnar í norðurlendsku ráðunum havt tríggjar netbornar fundir í árinum sum fór.

Í desember í ár var forkvinnan í SER á fundi við forkvinnuna og aðalskrivaran í Etiska Ráðnum og forkvinnuni í Psykologfelagsins Siðasemisnevnd. Ætlanin er at hava regluligar fundir, men hesin fundurin í desember var hin fyrsti og einasti í árinum sum fór. Avtalað varð at skipa fyri einum tiltaki um avbjóðingar við koronu, sum allarhelst verður í februar, um allir snøklar koma upp á pláss til ta tíð og Koronahandfaringin annars loyvir tí. Lýst verður við tiltakinum, tá alt er komið upp á pláss.

2021 var eisini árið, har bóklingurin "Etisk refleksjón í sjúkrarøkt" var útgivin. Hesin er at finna á heimasíðuni hjá FFS og á Facebookbólkinum hjá SER, sum ber heiti "Sjúkrarøktaretiska Ráðið".

Saman við áhugafeløgunum og føroyska umboðnum fyri Nordic Committee on Bioethics (NCOB), hevur SER hetta seinasta árið arbeitt við at fyriskipa ráðstevnu um umsorganaretikk í smáplássum, sum verður í maimánað 2023. Hetta arbeiði er komið nakað áleiðis, og arbeiðið

heldur áfram í hesum árinum. Eisini er ætlanin at skipa fyri limatiltøkum og øðrum átøkum, men limirnir frætta meira, tá vit vita meira neyvt.

At enda fara vit at takka limum, áhugafeløgum, nevnd, forkvinnu og starvsfólk í FFS annars fyri dyggan stuðul og gott samstarv í farna ári.

Fyri Sjúkrarøktaretiska Ráðið

Jana Mortensen, Forkvinna